Kjósa Ársins Songrødd um tvær vikur

ÁRSINS SONGRØDD
Tíðindaskriv

Nú nærkast tíðin til at »Ársins Songrødd 2003« byrjar, og leygarkvøldið tann 29.mars kl.23:00 í Badmintonhøllini í Havn, verður fyrsta innleiðandi umfar. Flestu støðini eru longu fullteknað, men pláss er eftir í Suðuri, Klaksvík og í Vágunum. Tey sum vilja luttaka, kunnu tekna seg til inni á heimasíðuni www.songroddin.com

Eins og undanfarin ár verður gjørt nógv burturúr, og í ár verða tað tey bæði Ragnhild Ellingsgaard og Jákup Jacobsen, sum vera frásøgufólk.

Higartil hevur bert nr.1 fingið vinning, men í ár fáa nr. 2 og 3 eisini vinning. Føroya Banki sum er høvisstuðil letur kr.5.000,- til nr.2. og Nr.3 fær kr. 2.000,- Vinnarin av kappingini »Ársins Songrødd 2003« fær umframt heiðurin, kr.10.000,-. Í ár eru tað 66 løg at velja ímillum sum øll hava verið "HIT" í 2002/2003, og tann sum teknar seg til, fær fløgu við postinum, sí heimasíðu. Fyri at luttakarar skulu hava so gott pallljóð sum gjørligt verður eitt sera stórt monitor-anlegg sett upp, sum er keypt heim til endamálið og eisini hevur luttakararnir møguleika at nýta sokallaðu "Inn-ear monitor" um ein eisini vil tað. Aftaná kappingina verður DJ-show og er tað sjálvur Mr. DJ-COOL alias Martin Kjærbo sum verður DJ. Í sambandi við tiltakinum, verður eisini eitt rimmar stórt lasara-show. Tiltakið byrjar sum nevnt kl.23:00 og dyrnar latað aftur kl.04:00.

Tøkk

Hjartans tøkk øll tit, sum sýndu samkenslu tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Karolina Simonsen á Høgabóli
Saltangará

doyði og varð jarðað.

Tøkk til kirkjutænarar og sangarar og fyri blómur, kransar og gávur til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim. Ein hjartans tøkk til heimahjálparar og starvsfólkið á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimið sum vóru so væl um hana.
Tøkk tit øll sum fylgdu.

Familjunnar vegna
børnini

Snarferð til Billund
- við flogfari og gisting
í 2 nætur í Billund
frá kr. 2.185* t/r fyri hvønn
MAERSK AIR
It's got to be perfect

FØROYA BANKI
lækkar rentuna

Danski Tjóðbankin lækkaði við gildi frá 7. mars 2003 diskontoina við ¼ pst. niður í 2,50 pst.

Sum avleiðing av hesum fer FØROYA BANKI við gildi frá 17. mars 2003 at lækka rentustig sínt á flestu útlánum og kredittum við ½ pst.

Rentustigini á flestu innlánum við uppsøgn verða lækkað við ¼ pst., meðan rentan á innlánum uttan uppsøgn verður óbroytt.

FØROYA BANKI

Far á flog...
Frá 16. januar til 28. mars 2003 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur. Ferðin kann vera í mesta lagi 4 dagar. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tínari ferðaskrivstovu ella á www.maersk-air.dk
Føroyar - Keypmannahavn og aftur*
Frá kr
1860,- fyri hvønn, inkrevt ferðasgjald
Føroyar - Billund og aftur*
Frá kr
1860,- fyri hvønn, inkrevt ferðasgjald
MAERSK AIR
It's got to be perfect

Goymslulærlingur
P/F Wenzel søkir eftir lærlingi til eykalutagoymslu okkara.
Starvið umfatar í høvuðsheitum sølu av eykalutum og annað goymsluarbeiði.
Førleikakrøv: Koyrikort er neyðugt.
Fyrimunir eru at hava HH ella FHS, men er tó ongin treyt.
Lærutíðin tekur úr 2 árum uppí 4 ár, alt eftir hvørja skúlagongd ein hevur.
Skúlagongdin í lærutíðini er í Danmark.
Umsókn saman við meguligum prógvum verður at senda til:
P/F Wenzel • Akranesgøta 5
Postboks 3043 • 110 Tórshavn
Att: Oddmar Ørvarodd.
Freist at søkja er 28. mars
Eru fyrispurningar, eru tygum vælkomin at ringja 354613 og spyrja eftir Oddmar, ella senda teldupost til: oddmar@wenzel.fo

Ferðafram sýning í Húsavík

Jarðfrøðisavnið og Náttúrugripasavnið hava sett eina framsýning upp í ungmannafelagshúsinum Sólarris í Húsavík. Hetta er fyrstu ferð, at hesi søvn hava eina framsýning uttan fyri Havnina. Framsýningin hevur verið í Havn síðan juni í fjør.

FRAMSÝNING
Magnus Gunnarsson

Framsýningin Oljuleiting við Føroyar byrjaði á Náttúrugripasavninum í Havn í juni 2002, og endar sýningin við vitjanum í Húsavík, á Tvøroyri og í Klaksvík. Leygardagin 15. mars letur framsýningin upp í ungmannafelagshúsinum Sólarris í Húsavík, har hon verður opin dagliga til 30. mars. Tað eru Jarðfrøðisavnið og Náttúrugripasavnið, ið saman skipa fyri hesi framsýning. Hetta er fyrstu ferð, at hesi søvn hava eina framsýning uttan fyri Havnina. Endamálið við framsýningini er at kunna fólk kring landið um føroysku undirgrundina, oljuleiting kring Føroyar og oljuvinnu sum heild. Á framsýningini hava børnini møguleika fyri at tekna og gera onkrar uppgávur. Áðrenn framsýningin letur upp, eru allir lærararnir í Sandoynni bodnir at sígga framsýningina og seta seg inn í, hvat hon snýr seg um, og hvørjar uppgávur børnini fáa, tá tey koma at vitja framsýningina. Opið er fyri almenninginum gerandisdagar frá kl. 16 til 19 og í vikuskiftinum frá frá kl. 15 til 19. Atgongdin er ókeypis, og fólk kunnu eisini ringja á telefon 361279 og avtala tíð.

Her verður framsýningin sett upp í ungmannafelagshúsinum Sólarris í Húsavík. f.v. Anette Jægerup savnsvørður, John í Sjúrðagarði og Ronica Øster savnsteknikarar. Lis Mortensen frá Jarðfrøðisavninum var eisini við til at seta framsýningina upp

Dygd verður skapað, tá ið tú gert tær ómak
Nýggi køkshandilin í Tórs-kafeteria við Sjónleikarhúsið hevur altfð okkurt serligt á skránni. Kom og sígg okkara nýggju køksframsýning við dygdar-køkum, baðirúmum og hvítvarum.
METROPOL KIRS-køkur verður seldur við 10 % í avsláttri!
METROPOL KIRS -10%
BIGA
Kekar gjørdir við nerlagni
BIGA-BLADIÐ NÝTT
124 síður við blómstri.
BIGA, Niels Finsens gøta 38, Tel. 32 06 66, Faks 32 06 67, biga@biga.fo, www.biga.fo